Starvslýsing

IKON // TEL 320 870



# Starvsfólk til bókhaldið

**Søkt verður eftir starvsfólki til bókhaldið at byrja skjótast tilber. Starvið er fjølbroytt, mennandi og fevnir um øll økir innan bókhald.**

Talan er um eitt starv, har tú fært høvið at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, sum er í støðugari menning, saman við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**

Avgerandi er, at tú hevur áhuga í fyrisitingarligum viðurskiftum og royndir innan bókhald. Tað er umráðandi, at tú er fyrikomandi og hevur hegni og hug at hjálpa til, har tað er neyðugt og tá á stendur.
Vit vænta at tú hevur lokið handilsskúlaprógv ella hevur royndir, ið eru samsvarandi við hesa útbúgving.

**Starvstreytir**

Løn, arbeiðstíð og onnur starvsviðurskifti eru eftir nærri avtalu.

**Umsókn**

Vilt tú vita meir um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Esmar Olsen, fíggjarleiðara á telefon 344012. Umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til eo@formula.fo ella við brævi til

**Formula.fo**
**Att. Esmar Olsen**
**Stiðjagøta 5**
**Postrúm 1078**
**FO-110 Tórshavn**

Vit vóna, at rætti umsøkjarin kann byrja uml. 1. desember 2008.
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 7. november 2008.

Formula.fo er ein KT fyritøka við 70 fólkum í starvi. Vit útvega vørur og tænastur í Føroyum og uttanlands. Í fyrisitingini á Formula.fo arbeiða í dag 5 fólk.

**formula.fo**

Stiðjagøta 5-11 · Tórshavn
Tel 344000 · www.formula.fo

---

SKEIÐ

## „Vegurin sum arbeiðspláss"

Dagarnar 17.–21. november skipar Landsverk saman við Vejsektorens Efteruddannelse fyri skeiðnum „Vegurin sum arbeiðspláss."

„Vegurin sum arbeiðspláss" er eitt kravt skeið fyri tey, sum arbeiða á ella fram við landsvegunum, og er um trygd í sambandi við vegarbeiði.

**Tvey sløg av skeiðum**

Landsverk hevur skipað fyri hesum skeiði fyrr. Eftir lokið skeið fær luttakarin eitt prógv, sum síðan skal endurnýggjast fimta hvørt ár. Tíðin er nú komin, at tey, sum vóru á fyrsta skeiðnum, skulu hava prógvini endurnýggjað.

Talan er sostatt um tvey ymisk skeið; annað er fyri tey, sum ikki hava verið á skeiði fyrr (2 dagar), og hitt er endurtøkuskeið (1 dagur).

**Kostnaður og tekning**

Kostnaður fyri hvønn luttakara er 7.000 kr. fyri vanligt skeið og 5.000 kr. fyri endurtøkuskeiðið. Íroknað prísin er matur, skeiðstilfar og prógv. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjum skeiði.

Til ber at tekna seg til skeiðið við at senda eitt teldubræv til Armgarð Steinhólm á ferðsludeplinum hjá Landsverki (armgard@lv.fo).

**Freistin er 3. november 2008.**

Lesið annars meira um skeiðið á www.landsverk.fo.

### Skeiðini „Vegurin sum arbeiðspláss" verða hildin hesar dagar:

| | |
|---|---|
| **17.–18. nov.** | **Byrjanarskeið** |
| **19. nov.** | **Endurtøkuskeið** |
| **20.–21. nov.** | **Byrjanarskeið** |

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

---

## Fáið næstan allar SKEMT

Higartil eru útgivnar 19 Skemt bøkur við meira enn 3000 tekningum. Onkur árgangur er útseldur. Ogna tær Skemtbøkurnar signeraðar av teknaranum fyri einans 680 kr. Og tú fært Skemt 2008 ókeypis til jóla.

**Sendið ein teldupost til skemt@sosialurin.fo ella ringið 211820/341800**

Tú kanst eisini fylla út lepan niðanfyri.



# SKEMT bøkurnar hjá Óla P

Um tú ynskir at gera brúk av tilboðnum um at fáa allar SKEMT-bøkurnar (íroknað 2008) fyri einans kr. 680, skalt tú bert fylla út lepan og senda hann til:

**Sosialurin**
Boks 76
FO-110 Tórshavn

**Ja takk!** Eg ynski at keypa allar Skemtbøkur (og fái 2008 ókeypis til jóla)

Verður sent óposta. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift: